árið. Nevndin kannaði frá 1947-58 um 13,5 mill. av 65 mill. á arbeiðs-marknaðinum, herav mistu 11.500 starvið. Henda ætlan fekk nógv neiligt umdømi (negativan kritikk.) Teir konservativu hildu ikki hetta vera nóg mikið at basa kommunismuni við, meðan teir liberalu hildu, at hetta var at bróta rættindi hins einstaka. Teir konservativu sigraðu, og fingu m.a. játtað, at FBI skuldi hjálpa HUAC nevndini í arbeiðnum at avgreiða óamerikansk fólk og felagsskapir.

Taft-Hartly lógin.

Á arbeiðsmarknaðinum var støðan baldrut. Tí samtyktu tingini 1947,ið vóru domineradi av konserva-tivum høgrakreftum, at seta ein lóg í gildi, ið skuldi avmarka fakfelagsrørsluna og verkfallsrættin. Taft-Hartley lógin, sum hon var nevnd. 60 dagar áðrenn tú fórt í verkfall, skuldi tú boða frá, at tú ætlaði tær í verkfall. Á henda hátt skuldi tú royna at semjast á einhvønn hátt áðrenn farið var í verkfall. Síðani kundi forsetin útseta verkfallið í 80 dagar, um tað var umráðandi fyri samfelagsbúskapin. Tey, ið sett vóru av stjórnini, fingu forboð at fara í verkfall. Fakfelags-leiðarirnir skuldu svørja at teir ikki vóru kommunistar, ella samstarvaðust við kommunistar. Ikki var longur neyðugt at verða limur í fakfelagi, fyri at fáa arbeiði. Her hvurvu so at siga øll rættindini, verka-feløgini høvdu vunnið í 30ðunum. Fleiri fakfelags-formenn vóru koyrdir og 11 verkafeløg vóru mett ólóglig.

HUAC-nevndin

HUAC nevndin fór av sonnum undir at finna undurgravandi fólk og felagsskapir, eftir at Parnell Thomas var vorðin formaður í 1946, og nýggir limir í nevndini vóru sera virknir at finna kommunistar. Serstakliga iðin var senatorurin Richard Nixon úr Kalifornia. Í fyrstu atløgu var lagt at JAFRC. Hetta var hjálparfelagsskapurin, ið tók sær av anti-fasistiskum flóttum. HUAC ynskti nøvnini á teimum, ið fíggjarliga høvdu stuðlað felagsskapin og nøvnini á øllum teimum hjálptu. Hetta sýtti nevndin fyri og vísti til grundlógina. Hetta gjørdi, at nevndarlimirnir fingu eitt ára fongsuls-revsing og 500 $ í bót hvør, vegna tvørrandi sam-starvsvilja. Hetta var í grundini fyrsti dómur HUAC feldi. Aftaná hetta fingu nevndarlimirnir rættuliga blóð á tonna, og øktu munandi um virksemi sítt. Í 1947 fór nevndin inn í Hollywood. Her vóru 10 sjónleikarir dømdir fyri vanvirðing av kongressini, tí teir ikki vildu svara øllum spurningum, við at vísa til grein 5 í grundlógini. HUAC avhoyrdi frá 1945 - 57 uml 3000 fólk, harav 135 vóru dømd fyri vanvirðing av kongressini. (sí annars dømi í kap. 2 um amerikanska kommunistaflokkin)

Vanligt var fyrsti spurningurin; "are you now, or have you ever been a member of the communist party." Síðani var hildið á, nøkulunda á henda hátt. Hesar avhoyringar vóru sera ringar at koma ígjøgnum, tí spurt varð so nær um teg og tínar vinir. Mangan vóru fólk dømd "guilty by association."

Lagnuárið 1949

1949 var árið tá kommunistaræðslan kom í hæddina, og helt sær her í nøkur ár. Hetta árið skifti Kina yvir til kommunismu, hóast USA hevði stuðlað tjóðskaparherdeildir Chiang-Kai-Sheks við vápnum. Hetta árið var Alger Hiss avhoyrdur hjá HUAC og í dómstólinum. Hiss hevði samstarvast nógv við stjórnina hjá Roosevelt og Truman, og hevði m.a. verið við á fundinum á Jalta. Hiss var m.a. skírdur "kommunistvinarligur" av Nixon, uttan at hetta var prógvað. Rætturin dømdi Hiss, fyri at hava noktað at givið nøkur skjøl til ein fyrrverandi kommunist, og at hava noktað at kent fyrrverandi kommunistin í 30'unum. Hann var dømdur 5 ára fongsulsrevsing. Við hesum dómi vóru eisini sera nógvar atfinningar av demokratisku stjórnini, vegna fyrrverandi samstarv við Hiss. 1949 breyt Sovjettsamveldið monopol USA, við kjarnorkuvápnum. Árið eftir leyp kommunistiska Norðurkorea á Suðurkorea. Hesi uttanlandaviðurskifti gjørdu, at kongressin fleirifalt økti játtanina til hervaldið, og avgjørt var at USA saman við ST skuldi hjálpa Suðurkorea. Kríggið vardi í 3 ár.

Hesir uttanríkisisfaktorar vóru við at økja um kommunistaræðsluna, og amerikanara vóru bangnir fyri, at hetta eisini kundi henda innanlendis. Úrslit av hesum var eisini McCarranlógin, ið var samtykt 1950. Henda lóg var sett í gildi fyri at verja grundlógina. M.a. skuldu allir felagsskapir skráseta limirnir hjá sær, ella kundi roknast við fongsulsrevsingum. Ein kommunistur var allýstur sum ein, ið ynskti at fella stjórnina gjøgnum herverk og njósning. Hjúnini Rosenberger gjørdust eisini offur undir kommunistaræðsluni. Tey vóru ákærd at viðvirka til at Russar framleiddu atombumbuna, og vóru avrættaði 1953. Próvtilfarið var sera lítið. Republikanar søgdu, at nýggj lond konverteraðu til kommunismu vegna ódugnaliga amerikanska stýrið. Demokratarnir vóru skírdir alt ov vinarligir mótvegis kommunistunum, og her var tað at McCarthy kom inn í myndina, og persónsforfylgingarnar gjørdust nógvar ferðir verri. Sum áður nevnt, so skuldu ákærd ikki prógvast sek, men sjálvi prógva at tey vóru ósek. Framferðarháttur McCarthys var at ákæra fólk og felagsskapir. Prógvaðu hesi so at tey vóru ósek, ákærdi hann nýggjar felagsskapir og fólk. Tað eydnaðist ongantíð McCarthy at prógva at persónur ella felagsskapir vóru kommunistar.

Hjúnini Rosenberg beint áðrenn tey vóru koyrd í hvør sín fongsulskliva. Tey vóru dømd sek í at hava givið russum skjøl, ið viðvirkaðu til at Sovjetsamveldið framleiddi kjarnorkubumbuna. Tey vóru avrættaði í 1953. Seinni er prógvað, at hetta ikki var satt...

Havi valt at siga lítið um tíðina frá 1950-54, bæði vegna plásstrot og tí uppgávuspurningurin um at lýsa bakgrundina fyri McCarthyismuni er, haldi eg, svaraður. Dømini í brotinum um amerikanska kommunistaflokkin og italiumennirnar eru eisini partur av bakgrundini.

Atlantis sum mentanardepil

Røðan, sum Jógvan E. Ósá helt, tá Atlantis alment var tikið í nýtslu hósdagin

Gerðabók Klaksvíkar Sjónleikarfelags tosar í 1956 um, at tey ætla at skipa fyri einum 50-ára jubileum fyri felagið. Við øðrum orðum er felagið helst stovnað í 1906.

50-ára minnisritið hjá KÍ, sum John Reid Bjartalíð skipaði fyri, tosar eisini um fyrsta sjónleikin, ið spældur var í Klaksvík – og mær er sagt, at tað skuldi vera *Hjá Dalabóndanum.*

Ímillum tey, sum vóru vit at spæla tann sjónleikin, vóru leikarar sum Katrin og Jógvan Kjølbro og Palli Sólstein.

Upp gjøgnum árini vóru nógvir sjónleikir spældir. Tá ið eg var smádrongur vóru leikir sum Magnus, *Systrarnar á Kinn, Løgmannsdóttirin á Steig* og *Charley's tanta* framførdir.

Seinast í fimti árunum kom stígur í felagið. Ein royndvarð gjørd at fáa lív aftur í felagið mitt í seksti árunum – eisini við leikinum Magnus – men felagið sovnaði aftur.

Í 1973 varð Sjónleikardeild KÍ stovnað. Orsøkin til hetta vóru fleiri. Loftið í KÍ-høllini stóð óbrúkt og tómt, og man vildi gera brúk av hesum høli. Harafturat hevði eingin leikur verið framførdur av klaksvíkingum í Klaksvík í mong ár. Tó høvdu vitjanir verið uttanífrá av og á.

Men tað sum avgjørt taldi við, og kanska ikki minst, var at útvega pening til KÍ.

Vit vóru nøkur, sum myndaðu Sjónleikardeild KÍ, og leikir sum Harvey og Oscar vóru framførdir. Klaksvíkingar tóku væl ímóti framførslunum, sum sjónleikardeildin framførdi, og nógv fólk komu til leikirnar.

Tað kemst ikki uttan um, at Sjónleikardeild KÍ kveikti tann neista, sum gjørdi, at sjónleikarlívið í Klaksvík vaknaði aftur.

Men tað var eitt men.

Vit vóru nøkur, sum ikki vóru nøgd við hendn hátt at skipa fyri sjónleiki í Klaksvík. Vit føldu, at vit í alt ov stóran mun »bert« skuldu útvega pening til ítróttin í Klaksvík, og at vit sjálvi fingu ov lítla gleði burtur úr hesum. Vit sóu, at um vit skuldu koma víðari, vóru vit noydd at skipa fyri okkum sjálvi.

Í 1977 var ein áheitan send til nevndina í Klaksvíkar Sjónleikarfelag, sum tá hevði sitið í langa tíð, tí ongin aðalfundur hevði verið í mong ár, um at fáa lív aftur í felagið– at endurstovna Klaksvíkar Sjónleikarfelag..

Nevndin tók væl ímóti hesum, og hin 8. september 1977 varð innkallað til fund í Klaksvíkar Sjónleikarfelag. Meginparturin, ið møtti á tí fundinum, vóru fólk úr Sjónleikardeild KÍ, og so vóru onnur, ið vóru biðin um at koma við.

Felagið varð endurstovna og nýggj nevnd varð vald. Fyrsti formaðurin í endurstovnaða felagnum var Hans David Matras.

Fólk fóru eldhuga undir at fáa lív aftur í felagið, og fyrsti leikurin, sum varð spældur, var *Karl XII*. Men ikki kann sigast, at vit fingu nógvar áskoðarar. Haldi at vit vóru 17 leikarar, og tað eina kvøldið vóru 13 áskoðarar. Tó varð spælt við lív og sál, sum um tað vóru fleiri hundrað fólk, ið hugdu at,. Fólk mistu ikki mótið av hesi orsøk.

Teir næstu leikirnir *Ongar blómur á grøvina, tøkk,* og *Hvør var tann seki* blivu væl móttiknir av áskoðarunum og so komu kassastykkini *Landastrokið* og *Friggjarafløkjan*, sum veruliga góvu vind í seglini og mót um at sjónleikur í Klaksvík var komin fyri at verða.

Eg skal her leggja afturat, at tað var Klaksvíkar Sjónleikarfelag og Havnar Sjónleikarfelag, sum settu Meginfelag Áhugaleikarafelag Føroya, MáF, á stovn, og øll, sum fylgja við sjónleiki í Føroyum vita, hvussu nógv hesin felagsskapur hevur havt at týða fyri sjónleik runt alt landið.

Síðani hevur gingið framá til vit í dag standa við hesum snotuliga húsi, sum felagið, saman við Klaksvíkar Býráð, Føroya Landsstýri og øðrum stovnum hevur gjørt til mentanardepil í Klaksvík, ið vónandi verður til gleði og gagn fyri tað fólk, ið her býr, og eisini úti um alt landið.

Tað kemst ikki uttan um, at tað unga fólkið í felagnum hevur verið ótrúliga rakst at náa hesum máli, sum vit standa við í dag. Tykkara partur hevur ikki ligið eftir, og tøkk skulu tit hava fyri tað.

Eg ætlaði ikki at draga nakran serstakan persón fram á hesum stóra og søguliga degi, men eg rokni ikki við, at nakar tekur meg illa upp, tá ið eg nevni eitt: Adelborg Linklett. Ta orku og ta tíð, sum hon hevur lagt í Klaksvíkar Sjónleikarfelag, eru kanska tey fáu, sum kenna.

Men vit vita tað. Og tað skal hon hava eina hjartans tøkk fyri. Uttan Adelborg kanska einki felag og einki hús í dag.

Við hesum orðum, ynski eg Atlantis góða eydnu.

Takk fyri.

Jógvan E.Ósá